# Miðlamjarr

Lýsing: MAKRELUR
– NÚ SUM VALAGN !
***Maður, 43 ár***

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein / Inna Törnroos



» *Eg veit ikki, hvat eg skal siga. Eg eri ill og súr.*

Danska reality-stjørnan Amalie heldur lítið um, at sjeikurin hjá henni verður lagdur undir at hava buka hana (Ekstrablaðið)

» *Obama er okkara sonur*

Libyski leiðarin Gaddafi um amerikanska forsetan





**Abbin sigur við abbasonin: Goym teg, tín lærari gongur uttanfyri, og tú hevur ikki verið í skúla í dag! Abbasonurin: Nei, goym tú teg, eg havi sagt við læraran, at tú er deyður!**
***Kvinna, 38 ár***

*Tey halda, tað vera stuttligt at síggja ein tjúkkan, hvítan mann sum tann einasta í teirra umhvørvi.*

Kokkurin Poul Rustin um at vitja familjuna hjá thailendsku konuni (Sosialurin)

**Verandi politiska støða er tað reina MAKRELGUF fyri tey politiskt áhugaðu tíðindafólkini**
***Maður, 43 ár***



» *Fert tú at brúka pengarnir uppá størri boppur?*

Hyggjararedaktørurin hjá Tv2, Lars Bennike, heldur, at Victoria Wild skal hava meira avbjóðandi spurningar enn hendan í sendingum hjá TV2.



» *Eru tit fresh, dreingir?*

Kristianna Winther Poulsen, forkvinna í Javnstøðunevndini, vísur, at bara menn standa fyri arbeiðnum at gera nýggja ungdómsbíbliu



*Eg havi ikki sæð eina sannførandi ætlan fyri virksemið, sum ger tað sannlíkt, at Saltsiloin á Drelnesi verður annað enn eitt tómleikans tempul – mentanarliga sæð.*

Mikkjal Helmsdal í bloggi

**Varð løgmaður cowboyari við True Grit (røttum mansdirvi) segði hann við Jørgin »You see, in this world there's two kinds of people, my friend: Those with loaded guns and those who dig. You dig.« Men hann sigur, sum pedagogurin í gulu stovu »nú eru vit øll glað, og spæla í sandkassanum við hvønn annan, eisini tit sum ikki tíma, og tú Jørgin sum hevur tikið grøna spakan og spannuna og formarnar at gera sandkaku við.«**
***Maður, 48 ár***